# 15. oktober børn heiðrað

SMYRIL
*dagfinn@sosialurin.fo*



Eitt, kanska eitt sindur óvæntað, innslag í undirhaldsskránni í samband við móttøkuna av nýggja Smyrli, var tá øll tey, sum fylla 15.oktober, skuldu á pallin. Torgerð Suðuroy og Maud Benjardøgg stóðu fyri hesum og tað hevði eydnast at savna 8 í ymsum aldri, sum hava føðingardag sama dag, sum nýggi Smyril kom til landið.

Upplýst var av pallinum, at tað eru eini 12 í Suðuroynni, sum fylla ár 15. oktober, men á pallinum sótu átta av hesum.

Toastmastarin minti skemtandi á, at hetta er vorðið sum merkisdagur, tí Smyril er komin og á palli sótu føðingardagsbørn í ymsum aldri, men danska TV avísin fyllir 40 ár og danska kongshúsið hevur fingið ein arving til krúnuna.

15. oktober børnini fingu ikki bara heiður, men eisini gávu. Tey fingu eina rósu og og eina ókeypis ferð við Smyrli aftur og fram til Havnar.

# Fingu ein lítlan hvøkk tá ið Smyril legði at

**Tað gekk ikki heilt sum eftir ánni, tá ið nýggi Smyril skuldi leggja at á Tvøroyri í dag. Men skipakøn halda at tað gekk avbera væl**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað gekk rættiliga væl at leggja nýggja Smyril at, tá ið hann kom á Tvøroyri leygardagin- hóast tað ikki gekk akkurát sum ætlað.

Og tað skerst ikki burtur, at øll tey mongu, sum vóru komin saman á bryggjuni at taka ímóti, fingu ein lítlan hvøkk.

Frammanundan var ivast í um tað yvirhøvur fór at bera til at leggja at í samferðsluhavnini, tí Smyril 1 lá har frammanundan. Men tað vildu mong ikki góðtaka, tí har eru tvey atløgupláss.

Men at tað ikki er bara sum at siga tað at koma til lands við so stórum, nýggjum skipið, gekk sjón fyri søgn, tá ið hann skuldi leggja at.

Tá ið hann var komin heilt inn ímóti bryggjuni og var bundin við einum enda, fór hann brádliga útfrá aftur við fitt av kraft á maskinunum.

Tað stóð heilt nógv á endanum og nógv stúrdu fyri, at hann skuldi slitna og gera skaða. Men teir umborð vóru kvikir at lora og tað bjargaði støðuni.

Hetta hendi tvær ferðir, men so kom hann at og varð liggjandi í øllum góðum.

Pauli Larsen, skipari, sigur, at hetta var fyrstu ferð, at hann leggur skipið at og tað er slíkt, sum kann henda, tá ið ein er fullkomiliga óvanur við eitt so stórt skip.

Sjálvur er hann kendur bæði av ferðafólki og manning á Smyrli sum ein avbera lagaligur og hegnigur skipari so ongin ivast í, at tá ið hann hevur roynt hetta nakrar ferðir, verður hetta ikki nakar trupulleiki.

Eitt av fólkunum, sum var við at sigla Smyril heim úr Spania, var Magnus Magnussen, sum var tekniskur stjóri á Strandferðsluni, táið Smyril var fyrireikaður og hann hevði eisini byggileiðsluna til fyri einum ári síðani, tá ið hann fór í annað starv.

– Hóast summi kanska halda, at tað gekk seint at leggja at, haldi eg, at tað gekk avbera væl, heldur hann.

Hann sigur, at tað, sum hendi, er ikki annað enn, hvat er væntandi, tí hetta er eitt heilt annað skip, bæði í stødd og maskinkraft, enn Smyril, sum nú gevst. Tískil er tað skilligt, at tað skal venjing til.

– Tað er onki uttan venjingin, sum manglar og tá ið skiparin hevur roynt hetta nakrar ferðir, verður hetta ongin trupulleiki, heldur hann.

Verri var, at tá ið fólkið skuldi sleppa umborð at hyggja, tóku tøkniligir trupulleikar seg upp við hekkuportrinum, so tað tók langa tíð at fáa tað niður.

Men eisini tað dugdu tey flestu at taka sum eitt upplivilsi. Onkur spurdi um tey mundu hava gloymt lykilin til portrið eftir í Spania. Nei, heilt onkur annar, orsøkin var, at brúkaravegleiðingin til portrið var skrivað á sponskum....

Veruliga støðan var, at eitt lítið, tøkniligt brek gjørdi, at tað ikki gekk sum ætlað at fáa portið niður.

– Tað er heldur ikki annað enn hvat er væntandi, tá ið eitt skip, sum er so stórt og hevur so nógva tøkni, verður tikið í nýtslu fyrstu ferð, sigur Magnus Magnussen.

– Eg vil ikki kalla trupulleikarnar við atleggingini og hekkuportrinum nakað óvanligt.Tvørturímóti er slíkt púra vanligt, tá ið talan er um eitt stórt og nýtt skip, sum ongin er vanur við.



*Øll tey túsundtals fólkini, sum tóku ímóti nýggja Smyrli, fingu ein hvøkk. Men tað var onki óvanligt á ferð, tvørturímóti gekk tað væl, heldur Magnus Magnussen, skipakønur, sum var við*

# Nýggi Smyril sera vælegnaður til Suðuroyarsigling

**Tá ið teir sigldu heim úr Spania, var stormur beint ímóti ta einu náttina, men tað gjørdi ikki mun**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nýggi Smyril verður sera vælegnaður til Suðuroyarsiglingina

Tað ivast skiparin á heimferðini, Pauli Larsen, ikki í.

Hann sigur, at Smyril er smíðaður serliga til hesa farleiðina.

– Tað er heilar 24 metrar breitt, sum er 7-8 metrar breiðari enn Smyril er, sum nú fer í søguna og sostatt er tað ógvuliga stútt í sjónum

– Harafturat er forskipið ógvuliga slankt, so hann er smíðaður til at skera seg ígjøgnum alduna og fer ikki at bresta so illa, tá ið hann er ímóti.

– Tí er hetta eitt skip, sum uttan iva fer at vera heilt munandi róligari í sjónum enn Smyril 1 er, sum nú fer í søguna.

Harafturat siglur tað skjótt og hevur nógva maskinkraft og er tískil gott at manøvrera við

Annars siga bæði hann og onnur, sum vóru við úr Spania, at hann ber seg ómetaliga væl.

– Ta einu náttina, vit sigldu framvið Portugal, var stormur beint ímóti. Hann hann uppførdi eg ógvuliga væl í sjónum og hann helt ferðina akkurát sum onki.

Annars er hann sera væl nøgdur við skipið annars.

– Tað er í øllum førum rúmsátt umborð, sigur Pauli Larsen.

Og so eru umstøðurnar til ferðafólkið umborð á hesum skipinum ikki at samanlíkna við umstøðurnar umborð á Smyrli eitt.



*Pauli Larsen, skipari, ivast ikki í, at Smyril fer at roynast suðuroyingum væl*

## Meiri um Smyril

**Í blaðnum í morhin hava vit meiri tilfar um móttøkuna av nýggja Smyrli og annað tilfar í tí sambandi**